## Starv

Søkt verður eftir einum framfýsnum fólki til leksiuhjálp til næmingar í Vágs- og Porkeris kommunu

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur læraraútbúgving ella líknandi førleika, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðar samstarvseginleikar.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, leiðara á Sosialu Deild tlf. 37 36 04, ella til Sakaris Dimon, samskipara á NSR Suður tlf. 238771 ella t-post sakaris@nsrsudur.fo

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Anna Djurhuus í seinasta lagi **17. oktober 2008 kl 12.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

# Eykaaðalfundur

**Listafelagið hevur eykaaðalfund týsdagin tann 28. oktober kl. 16 í Listasavninum.**

**Nevndin**



## Dansifelagið Upp á Tá

### Dansiskeiðið veturin 08/09

**Byrjað verður aftur at dansa sunnukvøldið 12. okt. kl. 20.00 í fimleikarhøllini í Sørvágs skúla.**

**Nýggir og gamlir dansarar eru vælkomnir.**

**Upp á Tá**

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# KUNNGERÐ

## UM VALEVNISLISTAR TIL KOMMUNUVALIÐ Í FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at sambært kunngerð frá Løgmálaráðnum, dagfest 23. september 2008 verður kommunustýrisval í Fuglafjarðar kommunu **týsdagin tann 11. november 2008.**

Ein valevnislisti kann í mesta lagi hava 13 valevni og skal verða undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal verða ein serligur listi yvir stillarar, hvar teir skiliga eru lýstir við navni, starvi og bústaði.

Ein persónur kann bert verða stillari á einum lista.

Valevnislistar skulu latast inn til *Jákup Frants Larsen*, býráðsskrivara ella *Arnold Abrahamsen*, valnevndarformann **í seinasta lagi 21. oktober 2008 kl. 18.00** av einum stillara.

Uppskot um, hvussu ein valevnislisti eigur at verða settur upp, kann verða fingið til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna ella valnevnevndarformannin.

Avgreiðslutíðirnar á býráðsskrivstovuni eru millum kl. 10.00 og 15.00 mánadag til og við fríggjadag.

Býráðsskrivstovan hevur tann 21. oktober 2008 opið til kl. 18.00.

*Fuglafjørður, tann 01. oktober 2008*

**Kommunuvalnevndin**
Arnold Abrahamsen
formaður



**VW Golf 2.0 TDI**

**VW Golf 2.0 TDI Sportline** við 140 hk. Bilurin er frá 24/4-06. Hevur koyrt 18.000 km. Nógva eykaútgerð, t.d: DK-pakki við klima, RCD 500 anlegg við 10 hátalarum, metallakk, leðurróður, multifunktiónsanlegg plus, tokulyktir, ljós + sjón pakki, o.a.

Nýprísur: kr. 350.000,-

**Prísuppskot kr. 250.000,-**

**Ring 510 298 ella 210 298**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Stuðul til Sosialu Deild á Tvøroyrar Kommunu

Sosiala deild á Tvøroyri søkir eftir fólki at byrja so skjótt sum til ber. Talan er um eitt stuðulsarbeiði hjá einum barni við serligum tørvi. Barnið hevur eina sjuku, sum hevur við sær ymiskar trupulleikar fyri barnið, sum tískil má fáa hjálp í dagansingini og í heiminum.

Arbeiðið er eitt fulltíðarstarv, har ein arbeiðir hálva tíð í dagrøktini og hálva tíð í heiminum hjá barninum.

Stuðulin skal vera við til at gera gerandisdagin hjá barninum so góðan sum tilber, so barnið kann mennast á ein fullgóðan hátt. Arbeiðið verður skipað í samráð við Dagrøktina á Tvøroyri og Sosialu Deild við møguleika fyri regluligari ráð- og vegleiðing.

Stuðlin arbeiðir tætt saman við familjuni og dagrøktini, umframt øðrum fakbólkum t.d. fysioterapeutum og stuðulstoymi á Tvøroyri fyri børn við serligum tørvi. Tað er tískil týdningarmikið at stuðulin dugir at tillaga seg, samstarva, er opin, positivur og hevur tol. Tú mást duga at síggja møgulleikar fram um mørk, so barnið fær avbjóðingar í degnum.

Ynskiligt er at tey, ið sett verða, hava hóskandi fakliga útbúgving og royndir innan mennandi arbeiði við børnum t.d. námsfrøðingur, lærari, ergoterapeutur, e.l. Men fólk við aðari viðkomandi útbúgving ella royndum eru eisini vælkomin at søkja.

Arbeiðið hevur við sær nokk so fitt av koyring. Tann, ið settur verður, má tískil hava bil og koyrikort.

Lønar- og seturnarviðurskifti sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi hin 15.10.08 og skulu stílast til:

Tvøroyar Kommuna
Sosiala Deild
Tvøráv. 37
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri
Att; Susanne Madsen

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf.: 371085 hjá Susanne Madsen allar gerandisdagar kl. 10.00-16.00 ella Súsannu Poulsen á tlf. 211339.

**ókeypis.fo**
***...fá meira fyri einki!***
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!

Sosialurin -har tað hendir